LM-065/2023

FYLGISKJAL 5

Sólgerð Hjørleifsdóttir

Fra:	Birta Biskopstø
Sendt:	11. december 2023 11:54
Til:	Almanna- og mentamálaráðið
Cc:	Jackline Hjørleifsdóttir Simonsen
Emne:	TAKS viðmerkingar: 23/19640 - TIL HOYRINGAR - Uppskot-til-broytingarløgtingslóg um kringvarp - freist 11. desembur kl. 12.00

TAKS hevur hesar viðmerkingar til uppskotið.

Almennir stovnar
Verandi lóggáva ásetur, at landsstovnar og kommunalir stovnar skulu gjalda kringvarpsgjald, og grundarlagið er útgoldin løn árið frammanundan. Men lógin hevur onga definitión av, hvat ein landsstovnur ella kommunalur stovnur er, og hetta ger tað trupult hjá TAKS at krevja kringvarpsgjald inn.
Almennir stovnar gjalda lønir út umvegis V-talið hjá Gjaldstovuni, og so hava teir ymisku stovnarnir a-tøl, summir meira og summir minni, og útfrá hesum verður kringvarpsgjaldið roknað. Tað vísir seg tó, at ikki allar rokningar vera goldnar, tí móttakarin av rokningini ikki metir seg at vera ein almennan stovn.
Av tí at lóggávan ikki hevur nakra definitión av almennum stovni, og TAKS hevur ikki er myndugleiki á økinum, so kann TAKS ikki avgera, hvør skal undantakast, og hetta ger lógina trupla av umsita.

TAKS mælir tí til, at tað í lógini verður definerað, hvat ein almennur stovnur er.

Eisini mæla vit til, at lógin ásetur – ella fær heimild at gera hetta í kunngerð, at Mentamálaráðið, sum myndugleiki á økinum, fyrst í januar mðr fær eitt yvirlit yvir hvørji A-tøl hava goldið løn út og innanfyri 1 mðr boðar TAKS frá, fyri hvørji A-tøl kringvarpsgjald ikki skal gjaldast. TAKS kann síðan í sínum skráum taka hædd fyri hesum, soleiðis at somu A-tøl heldur ikki koma við næstu ferð.

Eisini verður mælt til, at tá ráð og stovnar verða niðurløgd/umskipaði, so skal lógin geva Mentamálaráðnum heimild til at áseta, um ella hvør so skal gjalda kringvarpsgjaldið, sum verður roknað útfrá lønini hjá táverandi ráði ella stovni.

Fyri at effektivera innkrevjingina mæla vit til, at tað verður Gjaldstovan, sum bókar kringvarpsgjøldini í høvuðsbók útfrá upplýsingum frá TAKS – tvs. sum útreiðslu hjá stovnunum og inntøka hjá Kringvarpinum. Á hendan hátt slepst undan avgreiðslutíð hjá almennu stovnunum og møguligari rykkjaraprocedurum og rentutilskriving hjá TAKS, tí alt er sami kassi. Hetta hevði verið ein stór effektivisering.

Kommununalir stovnar
Eins og fyri almennar stovnar mælir TAKS til, at lógin definerar, hvat ein almennur stovnur er.
Kommunurnar hava (vanliga) bara eitt V-tal pr. kommunu, sum løn verður goldin umvegis. Við verandi mannagongd heitir TAKS á kommunurnar um at útgreina teirra lønir pr. kommunalan stovn. Tað er misjavnt, hvussu tað gongur at fáa uppgerðirnar innaftur, og tað kemur meir enn so fyri, at rykkjast má fleiri ferð, og at upplýsingar ikki eingongd koma inn í røttum ári.

Hetta er óneyðuga tungt at umsita, so tí mælir TAKS til at lógin gevur TAKS heimild at meta tær kommunur, sum ikki koma við eini uppgerð innan eina ávísa freist.

Eins og við almennum stovnum mælir TAKS til at effektivisera innkrevjingina við at tað verður tikið við í kommunuavrokningina. Kommunur kundu t.d. fingið freist til 1. mars at komið við uppgerð, og so kundi tað verið tikið við í kommunuavrokningini, sum verður avgreidd í apríl.

Vinarliga

Birta Biskopstø
Deildarstjóri

LM-065/2023

Lógardeildin og Tolldeildin

TAKS

Postrúm 2151, 110 Tórshavn

www.taks.fo, taks@taks.fo, tel. 35 26 00

Fyrivarni

Ert tú ikki rætti móttakari av hesum teldubrævi, vinarliga sig mær frá og sletta brævið.

Fra: Almanna- og mentamálaráðið <ammr@ammr.fo>
Sendt: 28. november 2023 12:16
Til: skrivstova@akf.fo; blf@blf.fo; jon@kvf.fo; kf@kf.fo; kvf@kvf.fo; lp@eldri.fo; starvsfelag@starvsfelag.fo; Kundatænastan á TAKS <taks@taks.fo>; industry@industry.fo; Løgmálaráðið <lmr@lmr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Umhvørvismálaráðið <umhvorvi@umhvorvi.fo>; Barna- og Útbúgvingar Málaráðið <bumr@bumr.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Sosialurin <post@sosialurin.fo>; Sosialurin <post@sosialurin.fo>; news@kringvarp.fo; vp@vp.fo; webmaster@sudurras.fo; sandportal@sandportal.fo; info@nordlysid.fo; oyggjat@olivant.fo; redaktion@ting.fo; joanis@jn.fo; dimma@dimma.fo; ras2@ras2.fo; news@r7.fo
Cc: Sirið Stenberg <Sirid@ammr.fo>; Eyðun Mohr Hansen <Eydun@ammr.fo>; Torkil Vestergaard Rasmussen <TorkilR@ammr.fo>; Alda Joensen <AldaJ@ammr.fo>
Emne: 23/19640 - TIL HOYRINGAR - Uppskot-til-broytingarløgtingslóg um kringvarp - freist 11. desembur kl. 12.00

Til hoyringarpartartarnar

Við hesum verður uppskot til broyting í løgtingslóg um kringvarp sent til hoyringar.

Endamálið við broytingaruppskotinum er at tryggja, at Kringvarpið so líðandi kemur í fíggjarliga javnvág og at tryggja inntøkugrundarlagið móti árligum prísvøkstri. Eisini er eitt av endamálunum at lækka gjaldskyldugu upphæddina hjá smærri virkjum og stovnum.

Skotið verður upp at styrkja Kringvarp Føroya fíggjarliga við at hækka gjaldið úr kr. 150,00 um mánaðin og upp í kr. 163,00 um mánaðin. Hjá fólki í fólkapensjónsaldri verður skotið upp at hækka gjaldskyldugu upphæddina úr kr. 50,00 og upp í kr. 63,00 kr.

Viðmerkingar verða at senda Almanna- og mentamálaráðnum - ammr@ammr.fo í seinasta lagi **mánadagin 11. desembur 2023, kl. 12:00.**

Vinarliga / *Kind regards*

ALMANNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Social Affairs and Culture

Eirargarður 2 / FO-110 Tórshavn / Faroe Islands
Office: +298 304000 / ammr@ammr.fo / www.ammr.fo